# B36

**Bóltfelagið 1936**
Postsmoga 1136
FO-110 Tórshavn
www.b36.fo

**STOVNAÐ**
28.03.1936

**FORMAÐUR**
Per Hansen

**MEISTARAR (8)**
1946, 1948, 1950, 15959, 1962, 1997, 2001, 2005

**STEYPAVINNARAR (5)**
1965, 1991, 2001, 2003, 2006

**GREIPUVINNARAR (1)**
2001

**Í 1. DEILD (62 ár)**
1942-1943, 1945-1984, 1986, 1988-

**Í EUROPA (10)**
Meistarakappingin
1998/99, 2002/03, 2006/07
Steypavinnar 1992/93
UEFA Cup 1999/2000, 2000/01, 2004/05, 2005/06
Intertoto 1997/98

# B36 er størsta spurnartekinið

**Í 1997 vann B36 FM fyri fyrstu ferð í 35 ár. Síðani tá hevur tað gingið sum eftir ánni hjá árstalsfelagnum**

B36 hevur aftur vunnið FM í 2001 og 2005, og bara tvær ferðir hevur B36 ikki vunnið heiðursmerkir. Í 2002 endaði B36 á fjórða plássi. Tað varð mett sum kiksari, og tað varð mett sum uppaftur størri kiksari, tá ið B36 í 2000 ikki megnaði meiri enn sætta plássið.

Bara tað besta er nóg gott hjá B36 – bæði í landskappingini og steypakappingini. Í fjør var B36 leingi besta FM boðið, men at enda stóðu teir í Gundadali við bronsukrónunum. Tað var ógvuliga stórt vónbrot.

Nú bjóðar B36 seg aftur fram, og aftur hesa ferð er málið at røkka toppinum. Men tað kemst ikki uttan um, at tað nógvu tey seinastu árini sjáldan hevur valdað so stór óvissa um fyritreytirnar hjá B36, sum tað ger hesa ferð. Í Klaksvíkskappingini endaði B36 á fjórða plássi, og úrslitini í venjingardystunum hava ikki altíð verið sannførandi.

Orsøkirnar til spurnartekinið eru eyðsýndar. Síðani síðsta kappingarár hevur B36 mist fleiri av lyklaspælarunum – Jákup Mikkelsen, Kenneth Jacobsen, Fróða Benjaminsen, Heina í Skorini og Sylla, og so er óvissa um onkrar av ungu monnunum, sum í vetur og í vár hava roynt seg uttanlands.

Heðin Askham roynir seg fyri fyrstu ferð sum Formula venjari. Afturat sær hevur hann Kára Nielsen. Teir eru báðir royndir spælarar, og teir hava brúk fyri øllum royndum og snildum, nú teir arbeiða við at fáa B36 liðið at fóta sær.

Meinhardt Joensen kappast við Jóan Paula Dahl Jakobsen um plássið millum stólparnar. Ingi Højsted tykist vera komin fyri seg aftur, eftir at hann var nógv skaðaplágaður í fjør, og einstakir spælarar eru komnir afturat, tó uttan at talan er um royndar spælarar.


*Nógvir ungir spælarar teljast í ár millum teirra, sum fáa stórt álit í B36*

Svenn F. Jacobsen, sum er verjuspælari, er komin úr HB, verjuspælarin Dmitri Jankovic er komin úr VB/Sumba, og framrættaði Karol Potemkin er komin úr EB/Streymi og so er tað miðvallarin Tamás Nagy. Ósemja hevur verið um Magnus Olsen, sum áður hevur spælt við B71, men undan steypadystinum ímóti Skála gjørdi aganevndin av, at Magnus kann gerast B36 spælari, og tað er stórur styrkur hjá B36 at fáa U21 landsliðsspælaran.

Millum menninar, sum skulu bera B36 fram, eru Klæmint Matras, Santos, Oddmar Færø, Bergur Midjord og Hanus Thorleifsson. Og so er tað spurningurin, hvussu Jóhan Ellingsgaard og Bogi Hermansen, ið aftur royna seg í B36, fara at standa seg. Millum blaðungu spælararnar, ið hava fingið møguleikan í venjingardystunum, og sum hava staðið seg væl, eru 17 ára gamli Róaldur Jacobsen og Ásbjørn V. Gunnarsson, sum hóast góð evni hevur staðið í skugganum av nógvum góðum miðvallarum.

Evnini tykjast góð, men tað er stórt tak at fáa spælararnar at rigga sum lið, ið skal blanda seg, har sum B36 plagar at kappast.

| **MÁLVERJAR** | Áður spælt við |
|---|---|
| Jóan Pauli Jacobsen | |
| Meinhardt Joensen | KÍ, B68, GÍ |
| **VERJA** | |
| Alex José dos Santos | |
| Svenn F. Jacobsen | HB, TB |
| Dmitri Jankovic | VB/S |
| Rúnar í Lon Jacobsen | |
| Ásbjørn V. Gunnarsson | |
| Herbert í Lon Jacobsen | B68 |
| **MIÐVØLLUR** | |
| Odmar Færø | |
| Hanus Thorleifsson | Skála |
| Bergur Midjord | |
| John Hansen | |
| Nagy Tamás | |
| Ingi Højsted | |

| **MIÐVØLLUR** | Áður spælt við |
|---|---|
| Magnus Olsen | B71 |
| Róaldur Jacobsen | |
| Klæmint Matras | |
| **ÁLOP** | |
| Karoly Potemkin | EB/S |
| Johan Ellingsgaard | AB |
| Bogi Hermansen | |
| **TILGONGD** | |
| Meinhardt Joensen | KÍ |
| Svenn F. JacobsenTB | |
| Dmitri JankovicS | |
| Nagy Tamás | |
| Karoly Potemkin /S | |
| Johan Ellingsgaard | |

| **FRÁGONGD** | |
|---|---|
| Jákup Mikkelsen | KÍ |
| Kenneth Jacobsen | AB |
| Jóhan V. Gunnarsson | Køge |
| Fróði Benjaminsen | HB |
| Mikkjal Thomassen | EB/S |
| Amed D. Sylla | av landinum |
| Heini í Skorini | av landinum |
| Anderson | av landinum |

**VENJARI**
Heðin Askham

**HJÁLPARVENJARI**
Kári Nielsen